Sjálvboðið frumskjal til sáttmálan um rættindi teirra brekaðu

Partarnir í hesum fylgiskjali eru komin ásamt um tað, ið niðanfyri stendur:

Grein 1

Partarnir í hesum fylgiskjali viðurkenna myndugleikan hjá nevndini fyri rættindum teirra brekaðu (hereftir Nevndin) at móttaka og at viðgera samskifti frá ella vegna einstaklingum og frá bólkum av einstaklingum undir hennara løgdømi, ið siga seg svíða fyri brot á sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi teirra brekaðu (hereftir Sáttmálin) framt av limalandinum.

Samskifti verður ikki móttikið, um tað viðvíkur limalondum til Sáttmálan, ið ikki eru partar í hesum fylgiskjali.

Grein 2

Nevndin skal meta eitt samskifti at vera óloyviligt, um:

a) Sendarin er dulnevndur;

b) Framferðarhátturin er brot á rættin at lata samskifti ella er ikki í tráð við ásetingarnar í sáttmálanum um rættindi teirra brekaðu;

c) Nevndin hevur longu viðgjørt málið, ella um málið longu hevur verið ella verður viðgjørt í aðrari altjóða eftirkanning ella semingsroynd;

d) Allir heimligir møguleikar til rættarbata eru ikki troyttir. Hetta skal tó ikki vera galdandi, um slík tilgongd verður óneyðuga drúgv ella ikki kann væntast at bøta um støðuna á nøktandi hátt;

e) Eyðsæð er, at samskiftið er illa grundað ella ikki nóg væl prógvført; ella um

f) Hendingarnar, ið samskiftið snýr seg um, fóru fram áðrenn fylgiskjalið kom í gildi fyri viðkomandi limaland, um ikki hesar hendingar halda áfram, eftir at fylgiskjalið er komið í gildi.

Grein 3

Við atliti at ásetingunum í grein 2 í hesum fylgiskjali, skal Nevndin í trúnaði kunna limalandið um tílíkt samskifti. Limalandið skal í slíkum føri innan seks mánaðir veita Nevndini skrivliga frágreiðing, ið greinar málið og lýsir møgulig átøk, ið limalandið hevur framt til tess at bøta um viðkomandi støðu.

Grein 4

1. Frá tí at samskiftið er móttikið og avgerð er fallin í málinum, hevur Nevndin heimild at senda viðkomandi limalandi eina bráðfeingis áheitan um at seta fyribils tiltøk í verk, til tess at forða fyri at óbótaligur skaði verður framdur móti tí ella teimum, ið siga seg vera fyri órætti.
2. Um Nevndin gera av at nýta sínar heimildir sambært grein 4, stykki 1, merkir hetta tó ikki, at samskiftið er loyviligt ella at støða er tikin til innihaldið í samskiftinum.

Grein 5

Nevndin skal viðgera samskifti sambært hesum fylgiskjali fyri læstum durum. Eftir viðgerðina skal Nevndin veita viðkomandi limalandi og kærupartinum sínar møguligu viðmerkingar og tilmæli.

Grein 6

1. Um Nevndin fær í hendi álítandi upplýsingar, ið benda á, at álvarsom ella afturvendandi brot á Sáttmálan verða framd av limalandinum, skal Nevndin heita á limalandið um at samstarva tá upplýsingarnar verða kannaðar og við hesum í huga at lata inn viðmerkingar til hesar upplýsingar.
2. Havandi í huga møguligar viðmerkingar frá limalandinum umframt allar aðrar álítandi upplýsingar, ið eru til taks, kann Nevndin gera av at tilnevna ein ella fleiri nevndarlimir at standa fyri eini kanning av málinum og í skundi at lata frágreiðing til Nevndina. Um neyðugt, og við góðkenning frá limalandinum, kann tílík kanning eisini fevna um eina vitjan til landið.
3. Eftir at niðurstøðurnar frá tílíkari kanning eru viðgjørdar, skal Nevndin veita limalandinum hesar niðurstøður umframt møguligar viðmerkingar og tilmæli.
4. Viðkomandi limaland skal innan seks mánaðir eftir at hava móttikið niðurstøður, viðmerkingar og tilmæli frá Nevndini lata egnar viðmerkingar til Nevndina.
5. Tílík kanning skal fara fram í trúnaði, og samstarv við limalandið skal roynast á øllum stigum í tilgongdini.

Grein 7

1. Nevndin kann heita á viðkomandi limaland, um at tað í síni frágreiðing sambært grein 35 í Sáttmálanum greinar møgulig stig, ið eru tikin, sum avleiðing av eini kanning sambært grein 6 í hesum fylgiskjali.
2. Eftir at teir seks mánaðirnir eru loknir, ið víst verður til í grein 6, stykki 4, kann Nevndin, um tørvur er til tess, heita á viðkomandi limaland um at lýsa hvørji stig eru tikin sum avleiðing av slíkari kanning.

Grein 8

Øll limalond kunnu í samband við undirritan, staðfesting ella formligari viðtøku av hesum fylgiskjali boða frá, at tey ikki viðurkenna myndugleikan hjá Nevndini sambært greinum 6 og 7.

Grein 9

Aðalstjóri Sameindu Tjóða fær litið hetta fylgiskjal í varðveitslu.

Grein 10

Londum og landspartafylkingum, ið eru partar í Sáttmálanum, stendur í boði at undirrita hetta fylgiskjal á høvuðsstøð Sameindu Tjóða í New York frá 30. mars 2007.

Grein 11

Lond, ið skrivað undir hetta fylgiskjal, og sum hava staðfest við lóg ella formliga tikið við Sáttmálanum, skulu staðfesta hetta fylgiskjal við lóg. Landspartafylkingar, ið skriva undir hetta fylgiskjal, og sum hava formliga staðfest ella formliga tikið við Sáttmálanum, skulu formliga staðfesta hetta fylgiskjal. Tað skal standa øllum ríkjum ella landspartafylkingum í boði at taka undir við fylgiskjalinum, um tey hava staðfest við lóg, formliga váttað ella tikið undir við Sáttmálanum, og um tey ikki longu hava skrivað undir fylgiskjalið.

Grein 12

1. ”Landspartafylking” skal merkja felagsskapur, ið fullveldisríki í einumhvørjum stórøki mynda, sum frá limalondum sínum hava fingið málsræði, tá ið tað kemur til mál, ið verða stýrd av Sáttmálanum og hesum fylgiskjali. Í formliga váttanar- ella viðtøkuskjali sínum skulu hesar fylkingar kunngera, hvussu langt málsræði teirra røkkur, tá ið tað kemur til mál, sum

Sáttmálin og hetta fylgiskjal stýra. Síðani skulu tær siga vørslufólkinum frá, um málsræði teirra verður munandi skert.

2. Hugtakið "limalond" skal í hesum fylgiskjali eisini fevna um slíkar felagsskapir, sum eru innan fyri mørkini fyri málsræði teirra.

3. Formlig skjøl, ið landspartafylking letur inn sambært grein 13, stykki 1, og grein 15, stykki 2 í hesum fylgiskjali, verða ikki tald við.

4. Tá ið ræður um mál innan málsræði teirra, kunnu landspartafylkingar nýta valrætt sín á ráðstevnuni fyri sáttmálapartar við tí atkvøðutali, sum svarar til talið á limalondum teirra, ið eru partar av hesum fylgiskjali. Hesar fylkingar skulu ikki nýta atkvøðurætt sín, um nakað av limalondum teirra nýtir sín rætt, og øvut.

Grein 13

1. Treytað av at Sáttmálin er komin í gildi, kemur hetta fylgiskjal í gildi tríatiunda dag eftir, at tíggjunda staðfesta ella viðtikna formliga staðfestingarskjalið er latið inn.

2. Í teimum ríkjum ella landspartafylkingum, sum hava staðfest, formliga váttað ella viðtikið hetta fylgiskjal, eftir at tíggjunda formliga staðfestingarskjalið hesum viðvíkjandi er latið inn, kemur fylgiskjalið í gildi tríatiunda dagin, eftir at hetta teirra egna formliga staðfestingarskjal er latið inn.

Grein 14

1. Fyrivarni, ið eru ósambærilig við mál og mið í hesum fylgiskjali, verða ikki loyvd.

2. Fyrivarni kunnu verða tikin aftur nær sum helst.

Grein 15

1. Allir sáttmálapartar kunnu leggja fram uppskot til broytingar í hesum fylgiskjali og lata aðalskrivara Sameindu Tjóða tað. Aðalskrivarin skal boða limalondunum frá øllum broytingaruppskotum og biðja tey siga sær frá, um so er, at tey eru hugað fyri limalandaráðstevnu til tess at meta um uppskotini og gera úrskurð. Um so er, at í minsta lagi ein triðingur av limalondunum – innan fýra mánaðir eftir at tey hava fingið boðini – eru hugað fyri hesari ráðstevnu, skal aðalskrivarin kalla inn til ráðstevnuna, ið verður hildin undir ST-eftirliti. Aðalskrivarin skal senda øll tey broytingaruppskotini, sum ein meiriluti góðtekur, ið telur tveir triðingar av teimum limalondum, sum vóru á fundi og sum atkvøddu, til ST-aðalfundin til samtyktar og síðani til øll limalondini til góðkenningar.

2. Broytingaruppskot, sum hevur fingið undirtøku og sum er góðkent samsvarandi 1. stykki í hesi grein, skal koma í gildi á tríatiunda degi, eftir at talið á formligum staðfestingarskjølum, sum eru innlatin, kemur upp á tveir triðingar av tí tali av limalondum, sum vóru á fundi tann dagin, tá ið tikið varð undir við broytingaruppskotinum. Síðani skal broytingaruppskotið koma í gildi hjá øllum limalondum tríatiunda dagin eftir, at tey hava latið sítt egna formliga staðfestingarskjal inn. Broytingaruppskotið skal bara vera skyldubindandi fyri tey limalond, ið hava góðtikið tað.

Grein 16

Limaland kann siga hetta fylgiskjal upp við skrivligari fráboðan til aðalskrivara Sameindu Tjóða. Uppsøgnin fer at virka eitt ár eftir tann dagin, aðalskrivarin hevur fingið fráboðanina.

Grein 17

Teksturin í hesum fylgiskjali skal gerast tøkur í atkomuligum sniði.

Grein 18

Arabisku, kinversku, ensku, fronsku, russisku og sponsku orðingarnar av hesum fylgiskjali hava sama gildi.

SUM VITNI UM TAÐ hava undirritaðu ráðharrar við lógligari fulltrú, hvør frá síni stjórn, skrivað undir hetta fylgiskjal.